## DAGSINS MEINING

# Ein ávaring

Í gjár var eitt ára minningarhald fyri yvirgangsatóknini móti jarnbreytastøðini í Madrid, har yvir hundrað fólk lótu lív. Ársdagurin var hildin við eini altjóða ráðstevnu, har nakrir av heimsins leiðarum og mætastu yvirgangsserfrøðingum vóru komnir saman at røða um útlitini fyri at minka um vandan fyri altjóa yvirgangi. Hósdagin flutti ST aðalskrivarin Kofi Annan røðu. Røðan er farin um allan heim og hevur vakt miklan ans. Kofi Annan boðaði frá, at nú er állvarsamaur vandi fyri einum yvirgangsálopi við kjarnokruvápnum á Europa.

Røðan var ein álvarsom ávaring til heimin og hon hevur vakt mikla ans og eins og hon hevur skelkað fólk í Europa. Tað er í grundini løgið, tí einki bendir á, at tað hevur eydnast at basa yvirganginum. Tað tykist heldur tvørturímóti og er væl heldur ikki so løgið, tí strategiin í antiyvirgangsherferðini higartil hevur verið skeiv. Lopið varð á Irak og hetta var ein liður í stríðnum móti altjóða yvirgangi. Men yvirgangurin bara stendur viðog versnar. Sjalvandi er rætt at stríðast móti yvirgangi við hermegi. Men hetta er bert ein partur av stríðnum. Tað er neyðugt at fara til rótina. Rótin til yvirgangin er tann stóri ójavnin millum framkomna og tilafturskomna heimin. Hartil kmeur stríðið millum Ísrael og palestinar og so hetta, at USA og Saudi Arabia eru so tærr kýtt hvørt at øðrum - allir trupulleikarnir í Miðeystri sum heild. Stríðið móti yvirgangi er eitt politiskt stríð og má rekast sum eitt politiskt stríð.

Kofi Annan ávaraði móti tí kós, sum USA og Bretland halda í stríðnum móti yvirgangi. Henda kós merkir, at londini í sínum ivri eftir at basa yvirrgangi í stóran mun hava gjørt seg inn á mannarættindini hjá landsins borgarum. Hetta er ein stórur vandi fyri fólkaræðið. Tað er nakað skeivt í hesum, at fyri at basa yvirganginum, sum í botn og grund er eitt ódemokratiskt fyribrigdi, verður hetta gjørt við at skerja demokratiið og alment viðurkend mannarættindi. Hetta kemur aftur um brekkur og tað var hesum aðalskrivarin ávarðaði ímóti. Tað ber ikki til at verja fólkaræðið við ódemokratiskum miðlum. Hetta er ein gomul sannroynd, sum vit bert kunnu vóna, at USA, Bretland og Rusland fara at viðurkenna. Hendir hetta ikki koma vit øll í størri vanda.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Suðuroyggin og Kypern syndromið

**Finnleif Guttesen**



Er hendan oyðileggjandi sjúkan við at fara í søguna, nú vinnufeløg í allari oynni tosa saman og ávísar kommunur leggja upp til samstarv?

Onkrir sjálvútnevndir "serfrøðingar" norðanfjørðs, skrivaðu um støðuna í Suðuroy, tá landsstýrið kom við einari ætlan um bygging av ellisheimi og miðnámsskúla. Til teir er bert eitt at siga, tit hava ikki ánilsi av, hvussu drepandi hetta Kypern symdromið er í Suðuroynni og fyri okkum øll, sum búleikast her.

Fyri at skera tað út í papp, so er støðan akkurát sum í Avstralia, har hvørki Sydney ella Melbourne kundu góðtaka tann annan sum høvuðsstað og tí bleiv Canberra, sum er væl minni og liggur ímillum teir báðar, høvuðsstaður.

Hetta er ein veruleiki sum suðuroyingar kenna alt ov væl, menn sokallaðir "lokalpatriotar" vilja ikki góðtaka broytingar, teir hugsa bert lokalt og um egnu áhugamál, og eru tí ein drepandi forðing fyri framburði í allari Suðuroynni.

### Kommunurnar mugu broyta hugburð og ganga fremst

Kommunurnar í Suðuroy, serstakliga Tvøroyrar og Vágs kommuna. hava gingið fremst fyri at verja hvørt sítt lítla kongaríki ella dunnuhyl, har má onki fara út um bøgarðarnar.

Skal nakað kommunalt arbeiði gerast, so skal tað helst gerast av arbeiðstakarum innan fyri bøgarðarnar, at bjóða tað út til arbeiðstakarar í allari oynni kemur næstan ikki uppá tal. Tað er so galið, at arbeiði fer heldur av oynni, enn at tað fer út um bøgarðarnar.

Tað sita fleiri kommunalpolitikarar, sum bert hugsa um egnu áhugamál og fáa hesir ikki mótspæl frá teimum, tíverri fáu, sum tonkja upp á heildina, ja, so eru hesi seinnu tíverri nakrar vatnissur, sum einki hava at gera í einum kommunustýri.

### Barnavernadarøki

Eitt mál, sum skuldi verði ein sjálvfylgja fyri allar kommunurnar at samstarvast um, er barnaverndarøki, og har hevur Porkeri tikið ábyrgd og bjóða seg fram til at húsa einari felags barnavernd.

Tað verður áhugavert at síggja, um politikararnir á Tvøroyri og í Vági hava dirvi til, at taka undir við hesum tilboðnum ella um lokal áhugamál fara at forða hesum.

### Brandmeistari

Tað verður søkt eftir brandmeistara til sløkkiliði á Tvøroyri, sum samstarvar við Hvalba.

Tankar hava verði frammi í Hvalba um, at, hví ikki søkja eftir einum brandmeistara fyri alla oynna, sum kann samansjóða øll sløkkiliðini og samstundis verði ráðgevi hjá kommununum í brunamálum.

Her verður tað aftur politikararnir á Tvøroyri og í Vági, sum skulu taka í egnan barm og vísa, at lokal áhugamál, sum til dømis, hvør skal hava starvi, ikki forðar fyri einum samstarvi.

### Kvøldskúlarnir

Tað er næstan skomm at síggja tær neyðars lýsingarnar frá kommununum í Suðuroy um kvøldskúla tilboð.

Hví í allari víðu verð krevja kommunurnar (tær gjalda 50%) ikki av kvøldskúlaleiðarunum, at teir gera eina felags kvøldskúlaskrá fyri alla Suðuroy. Harvið hevði uttan iva, komi fleiri tilboð og verði størri undirtøka. Og tað er góð tí, til at gera hesar broytingar til komandi vetur.

Vilja kvøldskúlaleiðarnir, sum man kann hava illgruna um, ikki verða við í hesum broytingunum, so er bert eitt at gera, skift teir út.

Um kommunupolitikarar serstakliga á Tvøroyri og í Vági, meina nakað sum helst við orðinum samstarv, vil komandi tíðin vísa. Tí tað er eingin ivi um, at politikararnir í hinum kommununum eru nógv meiri fyri samstarvi í allari Suðuroy enn politikararnir á Tvøroyri og í Vági hava verði.

Livst so spyrst.

# Grækarismessuhald í Runavík

Leygardagin 12. mars kl. 19.00 verður Grækarismessuhald á Torginum í Runavík.

Løgtingsmaðurin, Bill Justinussen, heldur røðu, og hornorkestrið spælir. Skótarnir ganga skrúðgongu frá Posthúsinum kl. 13.45.

Øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Runavíkar Býráð.

# Skeivt navn

Í greinini "Sitrandi list", sum stóð í blaðnum í gjár, er eftirnavnið á øðrum av listamonnunum tíverri komið skeivt fyri. Rætta navnið er Jan Nystrøm.

**Blaðkvinnan**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.